# Obama eftir bankunum

Barack Obama, forseti, ætlar sær ikki at seta seg afturá, nú hann loksins fekk meiriluta fyri heilsutryggingini. Longu dagin eftir ta søguligu samtyktina í Umboðsmannatinginum boðaði forsetin frá, at hansara næsta átak verður at fáa betri eftirlit við teimum amerikonsku fíggingarstovnunum. Millum annað skal eftirlitið tryggja, at tann vanligi amerikanarin skal ikki rinda fyri skilaleysar avgerðir hjá bankum og øðrum fíggingarstovnum. Samstundis skal mark setast fyri, hvussu stóra ávirkan ein banki kann hava.



# Kanna prestar og nunnur

Leiðslan í katólsku kirkjuni í bískupsdøminum í Regensburg í Týsklandi hevur gjørt av at kanna viðurskiftini hjá fýra prestum og tveimum nunnum, sum eru undir illgruna fyri kynsligan ágang ímóti fyrrverandi næmingum. Málið er tikið upp, eftir at meiri enn 300 fyrrverandi næmingar hava sagt, at teir vóru fyri kynsligum ágangi í Regensburg. Ein talsmaður fyri biskupsdømið segði á tíðindafundi í gjár, at fyriblilskanningar hava avdúkað álvarssom brot á reglur kirkjunnar. Hann segði, at málið verður kannað til botns.




# Spar 5.000 um árið

**Hvønn einasta dag standa ein rúgva av tólum í einum vanligum sethúsi og nýta óneyðuga nógvan streym. Her er eitt yvirlit yvir ringastu syndararnar, og hvussu tú kann spara heilt upp í 5.000 krónur árliga í streymi**

ORKUSPARING
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Eitt vanligt føroyskt húsarhald nýtir sambært SEV umleið 6.000 kilowatttímar (kWh) árliga. Hetta svarar til eina elrokning omanfyri 9.000 krónur árliga.

Men fleiri nýta uppaftur meira, og bert við nøkrum fáum inntrivum og íløgum er ein rúgva at spara.

Í hesi grein vísa vit, hvussu tú kanst spara heilt upp í 5.000 krónur um árið, bert við at skifta nøkur av teimum mest orkukrevjandi tólunum út við orkusparandi tól, og við at gera íløgu í nøkur lítil, orkusparandi tól.

## Frystiboksin

Í nógvum føroyskum kjallarum og kjallum standa upp í fleiri frystiboksir, sum vit nýta til at frysta kjøt, fisk og annað gott. Men er frystiboksin millum 10 og 20 ára gomul er hon næstan við vissu ein av teimum størstu streymtjóvunum í vanliga húsarhaldinum. Tí er nógv at spara við at skifta gomlu frystiboksina út við eina frystiboks ella frystiskáp, sum hava A+ orkumerkið.

Gomlu frystiboksirnar eru verri isoleraðar og hava eldri og meira orkukrevjandi útgerð til at køla við. Er frystiboksin millum 16 og 20 ára gomul, kann tú spara heilt upp í 1.130 krónur um árið.

Ein gomul Gram H590 frystiboks, sum varð seld millum 1990 og 1994, nýtir umleið 1040 kWh um árið. Hetta svarar til 1.573 krónur við dagsins elprísi.

Tekur tú hinvegin eitt nýtt frystiskáp frá Gram, sum er 368 litrar stórt, og hevur A+ orkumerkið, hevur tað einaárliga orkunýtslu á 435 krónur árliga.

Sostatt kann tú spara heilt upp í 1.138 krónur um árið við at skifta gomlu frystiboksina út, uttan at tú missir tað nógva plássið. Nøkur fá ár, so hevur íløgan spart seg sjálva innaftur.

**PRÍSGRUNDARLAG**

Dagsins streymprísur er, sambært heimasíðuni hjá SEV, 1,513 krónur fyri hvønn kWh hjá húsarhaldum, sum nýta undir 10.000 kWh um árið.

## Sirkulatiónspumpan

Ein annar orkuslúkari, sum er í allarflestu húsum í Føroyum er sirkulatiónspumpan á oljufýrinum, sum flytir heita vatnið runt í húsinum.

Hetta dømið er úr einum vanligum sethúsum, sum eru bygd onkrastaðni millum 1978 og 1995, upp á tvær hæddir og umleið 150 til 200 fermetrar stór.

Til eisini slík sethús nýta óreguleraðar sirkulatiónspumpur heilt upp í 70 watt um tíman, svarandi til 1,68 kWh um samdøgurið. Slíkar sirkulatiónspumpur koyra vanliga alla tíðina við fullari ferð, óansæð um tørvur er á tí ella ikki. Ein slík pumpa kann brúka fyri 900 krónur um árið av streymi.

Dagsins orkusparandi sirkulatiónspumpur nýta heilt niður í 6 watt um tíman, alt eftir brúkinum.

Í miðal, um sirkulatiónspumpan er yvir átta ára gomul, kann tú spara upp í 324 kWh um árið við at skifta hana út. Hetta svarar til eina árliga sparing upp á 490 krónur um árið. Er talan tó um eina heilt gamla sirkulatiónspumpu kann vera munandi meira at heinta har, við at skifta út til eina A-orkupumpu. Og tá er minkaða oljunýtslan ikki íroknað.

## Ljósperur

Nógv fólk hava hópin av umberingum fyri ikki at skifta glóðiperurnar út við spariperur. Men her er ein orsøk til júst at gera tað.

Her er roknað við at tú skiftir 10 glóðiperur, sum hava eina miðallivitíð upp á 1.000 tímar, út við A-spariperur, sum hava eina miðallivitíð upp á 10.000 tímar – tær fáast við livitíð úr 6.000 tímum upp í 15.000 tímar.